# Ítróttarblaðið

## Ítróttartoymið á Sosialinum:


Hilmar Jan Hansen
einslistir@email.fo


Uni Holm Johannesen
uni@sosialurin.fo


Tróndur Arge
trondur@sosialurin.fo


Heri Simonsen
heris@sosialurin.fo


Álvur Haraldsen
alvur@sosialurin.fo

## Helgi umhugsar comeback



Helgi L. Petersen umhugsar at royna seg sum fótbóltsspælara í bestu føroysku fótbóltsdeildini. Hann er partur av hópinum hjá NSÍ, sum fyrireikar seg til kappingarárið 2011. Helgi L. Petersen boðaði frá í 2007, at hann gavst, tí tað var torført hjá honum at samantvinna fótbólt á hægsta stigi og arbeiði. Hann hevur síðan spælt við ÍF í næstbestu deildini, og verið venjari hjá FC Hoyvík. Nú umhugsar hann at gera enn eina roynd. Hann venur við NSÍ, men tað er ikki endaliga staðfest, um hann fer at spæla við.

## Jóan Símun á blettinum

**FÓTBÓLTUR** Gateshead vann stórt í FA Trophy kappingini leygardagin. Millum málskjúttarnir hjá Gateshead var toftamaðurin, Jóan Símun Edmundsson

Tróndur Arge

Jóan Símun var tað sum tey í Onglandi kalla fyri »Cup tied« í seinasta umfarinum og kundi tí ikki spæla við. Men í hesum umfarium kundi Jóan Símun hjálpa nýggja liðnum hjá sær, tá teir leygardagin fingu vitjan av Hampton & Richmond Borough.

Dysturin endaði við einum 6-0 sigri. Jóan Símun skoraði til 5-0 og legði upp til eitt mál.

FA Trophy kappingin er ein steypakapping fyri liðini í fimtu deild og niðureftir. Næsti dysturin hjá Gateshead er í morgin, tá Barrow kemur á vitjan í landskappingini.

*trondur@sosialurin.fo*



## Trý gull til Føroyar

**BOGASKJÓTING** Føroysku bogaskjúttarnir vunnu trý gullheiðursmerki í kapping í Íslandi

Uni Holm Johannesen

Jógvan Niclasen vann gull í compound menn í gjár. Í hálvfinaluni skeyt hann 119-111, sum er ájavnt við føroyska metið.

Í finaluni skeyt hann móti besta íslendska skjúttanum og vann 114-110.

Eggaba Andreasen vann gull í recurve menn. Í fjórðingsfinaluni vann hann 106-78, í hálvfinaluni vann hann 109-97, og í finaluni vann hann 104-97.

Jim S. Guttesen tapti sín fyrsta dyst tepurt móti skjúttanum, sum var í finaluni móti Eggaba Andreasen. Jim S. Guttesen tapti tann dystin 96-97.

Jastrid M. Jensen vann gull í recurve kvinnur. Hon sat yvir fyrsta dystin og vann síðan finaluna 105-76.

*uni@soialurin.fo*



## Havnar Fimleikafelag vann alt

**FIMLEIKUR** Leygardagin var steypakapping í estetiskum fimleiki á Kambsdali. Kvinnur, unglingar og gentur kappaðust. Havnar Fimleikafelag stóð seg best

Uni Holm Johannesen

Hjá kvinnum kappaðust Havnar Fimleikafelag og Ljósið. Havnar Fimleikafelag vann. HF fekk 14,50 stig í alt, og Ljósið fekk 13,70.

Hjá unglingum kappðust fýra lið. Støkk, Ljósið, HF a og HF b. Havnar Fimlekaleika a vann. Støkk var nummar tvey, og Ljósið nummar trý.

Triðja kappingin var millum gentur, har fimm lið kappaðust. Flog, Støkk, HF a, HF b og Ljósið. Havnar Fimleikafelag a vann kappingina, nummar tvey var Ljósið og Havnar Fimleikafelag b var nummar trý.

*uni@sosialurin.fo*

## Miðlarnir skriva:

Hyggur tú at stigatalvuni, so hava neistamenn skotið flest mál, men farin eru eisini næst flest mál í neistamálið. Teir áttu satsa eins nógv í verjuspælinum, sum teir gera í álopsspælinum.

*www.neistin.fo*

Mest eyðsýndi maðurin hjá Kyndli ímóti StÍF í dag var Bárður Johannesen, sum skeyt meira enn helmingin av málunum. Annars gekst striltið í álopinum.

*www.kyndil.fo*

B36 skal sjálvandi framvegis vera eitt felag, har rúm er fyri øllum, men samstundis hava vit eitt ynski um at betra menningina av okkara egnu elitu.

*www.b36.fo*

Spurd um hvussu tað er við pengum í kvinnufótbólti, heldur Mona Breckmann ikki, at kvinnur skulu krevja ov nógv, tí tað er so lítil undirtøka í kvinnufótbólti, og at tað er betri uttan pengar í núverandi støðu. Hon heldur eisini, at kvinnurnar ikki skulu fáa sáttmálar enn, men at feløgini heldur skulu fáa pengarnar, so umstøðurnar verða betri, og undirtøkan fyri kvinnufótbóltinum kann betrast.

*www.faroesoccer.com*